## Kýr trampaðu kvinnu í til deyða

Týsdagin varð ein 55 ára gomul kvinna funnin deyð á eini fløtu á Fjóni. Talan er um eina kvinnu, sum saman við manni sínum hevði ein vistfrøðiligan bóndagarð. Sum skilst var kvinnan og hugdi til kýrnar, men hon kom ikki heimaftur. Maðurin gjørdist bangin um hana og fór at leita eftir henni. Stutt eftir fann hann hana liggja deyða á fløtuni. Deyða kvinnan hevði merkir í høvdinum og er helst deyð av, at kýrnar hava traðka á hana. - Hon var von at verða saman við kúnum, sum hon var sera góð við, men helst eru tað kýrnar, ið hava dripið hana, sigur Per Sterbo, ið er politistur á Fjóni. Í dag verður líkið kannað, tí løgreglan vil tryggja sær, at talan er um eina vanlukku og ikki eitt morð.

*Kelda: BT*



# Kringvarpið skal samansjóðast

**Fyrr hava sjónvarp og útvarp verið tveir ymiskir stovnar, við tveimum ymiskum leiðslum. Í summar søkti Kringvarpið eftir fólkið at manna seks nýggj leiðslustørv, og hesi hava sín fyrsta arbeiðsdag í dag**

KRINGVARP
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Nýggja leiðslan í Kringvarpinum er á einum máli um, at stovnurin skal gerast betri og at tað er teirra uppgáva at samansjóða útvarp, sjónvarp og internet*

Nógv tos hevur verið um, hvussu Kringvarpið í framtíðini skal síggja út, og hvussu hesi nýggju fólkini skulu loysa sína uppgávu. Í dag lyfti nýggi leiðslubólkurin lokinum í morgunsendingini hjá útvarpinum hjá Kringvarpinum.

### Alt skal digitaliserast

Hans Andor Johannesen er tøkniligur leiðari í Kringvarpinum, og tað fyrsta á skránni hjá honum er, at digitaliseringin ordiliga skal gjøgnumførast, so sum mest fæst burturúr báðum eindunum hjá Kringvarpinum.

- Tað er eitt langt tok, sum er fari í gongd, men tað er ein neyðvendigheit í dag at fáa alt tilfar, sum vit gera, digitalt, fyri at fáa miðlasamansmeltingina at fungera.

Hann leggur afturat, at lurtarin og hyggjarin skal vinna okkurt við, at alt er digitalt. Tað skal bera til at fáa atgongd til tað tilfar, kringvarpið ger, við fartelefon og internetið. Eftir ætlan skal alt sendinetið verða endaliga digitalt í summar.

### Miðladeildin

Miðladeildin er ein nýggj deild hjá Kringvarpinum. Allan Dalsgarð er leiðari á henni, og hann greiðir frá, at ætlanin við deildini er at geva teimum nýggju tøkniligu møguleikunum innihald.

- Vit skulu fáa stovnin til at hugsa í fleiri miðlum. At tey, sum gera útvarp, í framtíðini skulu hugsa tvørs av stovninum.

Enn eru ongi nýggj fólk sett á miðladeildini, men skrá og savn hoyra undir deildina, og har eru nøkur starvsfólk. Men í framtíðini skulu fleiri fólk setast, fyri at menna kringvarpið, so internetið og fartelefonin gerast veruligir møguleikar, saman við sjónvarpi og útvarpi.

### Programdeildin

Nýggi programleiðarin eitur Herluf Sørensen. Hann hevur arbeitt í kringvarpinum í nøkur ár, men fær nú eina víðkaða uppgávu. Hann metir sína uppgávu vera at fáa tað burturúr stovninum, so stovnurin fær ágóðan av teimum nógvu pallunum.

Men programleiðarin hevur longu gjørt nakrar broytingar.

- Vit hava fingið ein kvinnu inn á morgunflatuna og eina til seinnapartsflatuna, samstundis sum útvarpið nú byrjar at senda longu klokka seks, greiðir Herluf Sørensen frá.

Stóru broytingarnar sær Herluf Sørensen tó ikki fyri sær fyrr enn næsta summar og enn meira næsta vetur.

### Tíðindadeildin

Jón Brian Hvidtfelt er nýggjur tíðindaleiðari í Kringvarpinum, og gongur alt sum tað skal, so verða eindirnar savnaðar fysiskt innan stutta tíð. Eisini ætlar tíðindaleiðarin at vera við til at betra um tíðindini.

- Deildirnar eru lagdar saman. Frá í dag av eru tær lagdar saman, so nú er tað ein tíðindadeild fyri Kringvarpið. Í framtíðini skulu tær savnast undir somu lon. Har tað aftur verður býtt í nakrar dynamiskar eindir, sum kunnu arbeiða saman í hesi nýggju tíðindadeildini, sigur nýggi tíðindaleiðarin

Ætlanin er somuleiðis at menna fólkini á stovninum, so tíðindini gerast betri. Eisini skulu kjaksendingar og krittiskar sendingar gerast.

- Vit skulu gera seriøs, objektiv og perspektiverandi tíðindi, ið byggja á eitt gott handverk. Tá tú gert tíðindini, so er tað hvussu væl fyri einstaki journalisturin er, sum er avgerandi. Alt eftir hvussu vit fáa ment fólkini, so vil tað smitta uppá tíðindini, greiðir tíðindaleiðarin frá.

Sjálvur ætlar Jón Brian Hvidtfelt at halda fram at gera tíðindir, so hann ikki bara situr við skriviborðið.

### Dokumentardeildin

Barbara Samuelsen hevur fingið til uppgávu at finna fólk, sum ynskja at gera nakað meira burturúr ávísum sendingum, so at tey sum brenna fyri at gera okkurt eyka hava møguleika til tess. Men hon veit ikki heilt, hvat deildin fer at koyra á skíggjan.

- Dokumentardeildin er ein spildurnýggj deild, so presis hvat fyri sendingar vit fara koyra á skíggjan, kann eg ikki siga nakað um beint nú. Eg fari at tosa við fólkini hjá mær, og so fara vit at finna útav tí. Men onkrar nýggjar sendingar vera um stutta tíð, sigur Barbara Samuelsen.

Hon greiðir eisini frá, at barnaøkið er á hennara deild, og at deildin bæði fer at gera krittiskar dokumentarsendingar og bleyt portrettir. Tað seinna veldst um fólkini á deildini.

### Starvsfólka- og umsitingardeildin

Sanna Hansen er hin kvinnan í leiðslubólkinum hjá Kringvarpinum. Hon skal taka sær av gomlu umsitingini, men eisini starvsfólkarøktari.

- Starvsfólkarøkt er nakað nýtt vit skulu byggja upp. Vit skulu finna útav, hvat er tað vit skulu og hvat skal hendan deildin gera. Vit skulu taka okkum av starvsfólkunum, so at øll tingini sum verða gjørd hava eina adressu. Vit skulu vera við til at samansjóða stovnin, tí samanlegging er fyrst og fremst ein samanlegging av menniskjum.

Hon greiðir frá, at Starvsfólka- og umsitingardeildin eisini skal syrgja fyri, at útferðir og so framvegis vera á skránni.

# Lætta skattabyrðuna hjá føroyskum familjum

**Sjálvstýrisflokkurin hevur lagt fram uppskot um at dagføra inntøkumørkini í skattastiganum samsvarandi prísvøkstrinum. Uppskotið fer longu næsta ár at lætta um skattabyrðuna hjá skattaborgarum í Føroyum**

SKATTUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Upprunaliga hevði landsskattaskipanin ein stóran botnfrádrátt og inntøkumørk, ið tryggjaðu greiðan og rættvísan progressivtitet. Men dýrtíðin hevur merkt, at allar inntøkur hjá verkfólki, útróðrarmonnum og fólki við miðal útbúgving, sum frá líður, koma undir toppskatt. Nýbrotið í uppskotinum hjá Sjálvstýrisflokkinum er, at nú fara inntøkumørkini í skattastiganum at verða dagførd samsvarandi prísvøkstrinum, siga tingmenninir hjá Sjálvstýrisflokkinum, Kári P. Højgaard & Kári á Rógvi.

Víðari siga teir, at við at dagføra botnfrádráttin og mørkini verður longu næsta ár lætt um skattabyrðuna hjá føroysku familjunum, og føroyingar uttanlands fáa greitt at vita, at skattabyrðan í Føroyum ikki økist snikjandi við inflatiónini. Heldur verður skatturin tálmaður og fer tað at økja um virkishugin og hugin hjá fólki at flyta heimaftur til Føroya.

Broytingin verður gjørd á tann hátt, at inntøkumarkið í skattastiganum, sum eftir samtyktini hjá CHE samgonguni skal verða kr. 270.000 frá 1. januar 2009, verður lækkað aftur til kr. 250.000. Síðan verður prístalsjavnan ásett.

Fyri allar inntøkur merkir uppskotið, at ætlaða skattahækkingin næsta ár verður strikað, og ávísur skattalætti fæst samsvarandi prísvøkstrinum.